# August

# Stríðið varð flutt út á leikvøllin

**1. august**

Kappróðrarárið er av. Ólavsøkan varð hildin í øllum góðum, og seinastu meistararnir vórðu funnir.

Umframt tær fýra bátsmanningarnar, sum longu høvdu vunnið FM, verða menninir á Stráluni og teir hjá Vestmenninginum kosnir føroyameistarar.

Í superliguni gongst einki serligt hjá føroyingunum. Todi Jónsson og FCK tapa úti móti AGF, har Óli Johannesen ikki sleppur á vøllin, og Herfølge tapir 1-0 móti Lyngby.

Heldur í Íslandi gongst nakað serligt, har Leiftur alt meira líkist einum komandi niðurflytara.

Hinvegin er lagði gott í Sogndal. Kurt Mørkøre, sum nú verður róptur Måløre, skorar aftur, tá Sogndal vinnur á útivølli

**2. august**

Føroyska U-16 landsliðið tapir 6-0 móti Danmark í fyrsta dystinum í NM kappingini.

Rógvi Johansen roynist væl í danska A-bólkinum, og stigini á kontini gerast alt fleiri.

Guttorm Sørensen og Sunnuvá Bjarnastein vinna Grand-Prix kappingina í renning. Seinasta umfarið í hesi var ólavsøkurenningin.

**3. august**

Føroyska U-16 landsliðið er um reppið at skapa eina sensatión, men mugu kortini taka til takkar við teprum 2-1 tapi móti Finnlandi.

Tað røkist fyri, at øll atgongumerkini verða seld í forsølu til landsdystin móti Danmark.

**4. august**

Navnframi Ray Clemence er í løtuni í Føroyum, og Sosialurin hevur drúgva samrøðu við ensku málverjalegenduna.

Allan Simonsen hevur gjørt av, hvørjir teir 18 verða, sum skulu takast við Danmark.

Sóljan, sum í vetur skal royna seg í bestu kvinnudeildini, hevur gjørt avtalu við tvær litaviskar gentur um at koma higar at spæla.

**5. august**

Føroyska liðið tapir aftur, men í hálvleikinum stendur framvegis á jøvnum, 0-0, tá teir spæla móti Onglandi. Dysturin endar 0-3, og Ongland tryggjar sær finalusess.




*Fótbóltsfepurin man sjáldan hava herjað so nógv, sum hann gjørdi, tá Danska landsliðið í fótbólti kom á vitjan. Hetta var samstundis fyrsti dysturin hjá dønum við Morten Olsen og Michael Laudrup sum venjarum*

Í blaðnum er eisni samrøða við málverjan á enska liðnum, Lennie Pidgely, sum er sáttmálabundin at Chelsea, har Hasselbaink og Desailly teljast millum venjingarfelagarnar.

Fyrstudeildarliðini gera seg til, nú landskappingin í fótbólti verður uppafturtikin.

Birgir Sondum leggur fyribils dómarafloytuna á hillina. Hann kennir seg illa viðfarna av FSF.

**8. august**

Føroya sterkasti maður, Regin Vágadal, vinnur seg fram til finaluna, tá kappingin um at gerast heimsins sterkasti er í Suðurafrika. Í finaluni er Regin tó darvaður av skaða, men megnar tó at stríða seg ígjøgnum allar greinarnar.

Landskappingin fer aftur av barkastokki. HB er framvegis á odda, men nú er VB beint í hølunum á teimum. Í aðru deild eru EB/Streymur og TB framvegis púra jøvn.

Meðan føroyingarnir í Sogndal bara vinna, gongst verri í Danmark, har Herfølge er í botninum.

FS Vágar metir , at FSF ikki hevur handlað í tráð við reglurnar, tá spæliloyvi hjá Darius Magdisauskas er latið B36, og vilja nú hava endurgjald.

**9. august**

KÍ kvinnurnar stevna við fullari ferð móti FM-heitinum.

**10. august**

Gøtumenn hava góðar vónir undan dystinum móti svenska IFK Norrköping.

**11. august**

Herfølge tapir so ruddiliga, tá teir á heimavølli royna seg móti Glasgow Rangers í undankappingardysti til UEFA Champions-League.

Morten Olsen ger av, hvørjir teir 18 verða, sum skulu umboða danska landsliðið á føroyaferðini.

**12. august**

B36 tapir ikki minni enn 9-0, tá teir á útivølli royna seg móti AB í UEFA-Cup. Hinvegin gongst munandi betri hjá GÍ, sum tó má taka til takkar við einum 2-0 tapi móti Norrköping.

**15. august**

Í fremstu mansdeildini hevur VB nú lagt seg á odda. VB vinnur 1-0 á KÍ, samstundis sum HB søplar hópatals møguleikar, tá NSÍ vinnur 5-2 í Gundadali.

Í Danmark eydnast endiliga Herfølge at vinna, meðan tað framvegis sær eins svart út hjá føroyingunum í íslendska Leftur.

**16. august**

Danska liði er komið til Føroyar, og spenningurin undan landsdystinum er ovurhonds stórur.

Abraham Hansen, sum í 25 ár hevur verið á føroysku fótbóltstindunum, minnist aftur á tíðina á lands- og felagsliði.

Rani Christiansen, sum spælir á dreingjaliðnum hjá HB, er boðin til Middlesbrough at venja.

Í bestu kvinnudeildini er HB nú á odda. KÍ eigur tó tveir dystir til góðar.

**17. august**

Norðurlendskur flogbóltsfundur er í Føroyum, tá leiðarar úr ymsu londunum hittast á fundi.

**18. august**

Føroyar taptur dystin móti Danmark 2-0, men leingi høvdu okkara væl fatur á mótstøðumonnunum, og millum annað vórðu vit snýttir fyri eitt brotsspark. Føroysku leikararnir og venjarin iðra seg um tapið, sum kom eftir tvey heldur óneyðug mál í seinna hálvleiki.

**19. august**

Dysturin móti dønum gjørdu tey, sum vara at Tórsvølli, varug við fleiri lutir, sum kunnu betrast í framtíðini, og Poul Michelsen sigur, at tey nú fara at kanna, hvussu hetta kann betrast.

**22. august**

NSÍ heldur á fram at buka oddaliðini. Hesa ferð missur VB oddasessin, og Allan Simonsen hevur nú eyga við onkrum av runavíkingunum.

Julian Johnsson fekk reytt kort, tá Sogndal vann á gamla felagið hansara, Kongsvinger.

Hondbóltslandslðini eru afturkomin av venjingarlegu í Danmark, men landsliðsvenjarin, Palli Joensen, tykist ikki vera heilt nøgdur avrikið.

**23. august**

Fleiri føroyskir leikarar eru brádliga vorðnir áhugaverdir hjá útlendsku feløgunum, og nú eru 15 ára gamli Ingi Højsted og 17 ára gamli Jann Ingi Petersen bodnir til hollendska stórfelagið, PSV Einhoven.

**24. august**

GÍ og B36 gera seg nú til at leika seinnu dystirnar í UEFA kappingini.

**25. august**

Skála er nú á veg upp í næstbestu deildina, eftir at teir vunnu týdningarmikla útidystin móti AB.

FCK hevur gjørt av at keypa fyrrverandi landsliðsleikaran, Jacob Laursen.

Oyggjaleikanevndin ger av, at fimleikur verður á skránni komandi oyggjaleikirnar.

**26. august**

FCK keypir meira. Hesa ferð er tað sterki miðvallarin, Ståle Solbakken, sum kemur úr AaB.

Bæði B36 og GÍ tapa sínar dystir, men í báðum førum er talan tó um góð avrik móti ávíkavist AB og Norrköping.

**29. august**

Triðja vikuskiftið á rað skiftir oddurin í fótbóltskappingini. Nú er B68 á odda, eftir at HB og VB spæla javnt í Vági Í næstbestu deildini er EB/ Streymur einsamalt á odda. Trý stig undan TB.

Leiftur er á veg út av tromini, nú teir eru seks stig aftan fyri næst niðasta liðið í Íslendsku landssímadeildini.

Í Danmark vinna bæði FCK og Herfølge. Herfølge vinnur á AGF, har Óli Johannesen nú aftur er á veg inn í hitan.

Sogndla heldur á fram at vinna, teir halda framvegis fast um triðja plássið í norsku 1. deild.

**30. august**

Uppruddin er á skránni í B36. Venjarin og fýra útlendskir leikarar verða sendir heim, og sum um hetta ikki er nóg mikið, sendir B36 inn kæru um dómaravrikið í dystinum móti B71.

Í bestu kvinnudeildini tapir KÍ óvæntað fyri NSÍ, men tær halda tó fast um oddasessin.

**31. august**

Í triðju deild er toppurin sera tættur, men Skála heldur tó fast um oddasessin.



# September

# Atlantsrisin er føroyskur

**1. september**

Kappngarneytarnir hjá Regini Vágadal eru nú komnir til Føroya. Teir skulu kappast um at gerast Atlantsrisin.

**2. september**

Føroyar hava fingið ein nýggjan landsliðsleikara, nú Johan Byrial Hansen, sum annars er búsitandi í Danmark er úttikin til dystin móti Slovenia.

**5. september**

Føroysku hetjurnar eru fleiri. Øssur Hansen og Uni Arge skora, tá Føroyar innan tveir minuttir venda 0-2 til 2-2 móti Slovenia, og á Skansanum ger Regin Vágadal bart. Hann vinnur heitið sum The Atlantic Giant.

FSF umhugsar at spæla tveir landsdystir á Tórsvølli og tveir á Svangaskarði komandi ár.

Kæran hjá B36 um dómaraavgerð í dystinum móti B71 verður avvíst av kappingarnevndini hjá FSF. B36 kærir avgerðina til dómsnevndina.

**6. september**

EB/Streymur er nú fýra stig framman fyri TB í næstbestu mansdeildini. ÍF er á triðja plassinum

**7. september**

Dómaratrotið noyðir FSF at bróta FIFA prinsipp, har tað verður ásett, at altjóða linjuverjar ikki kunnu døma í bestu heimligu deildini.

**8. september**

Dómsnevndin hjá FSF staðfestur, at dómaraavgerðin í dystinum, B36-B71, stendur við. Dómsnevndin sigur seg ikki hava heimild at broyta dómin.

StÍF fær komandi ár hjálp frá trimum rumenum. Tveimum kvinnum og einum mannfólki.

**9. september**

Stór myndafrásøgn er í blaðnum, frá fiskitúri, sum sterku vinmenninir hjá Regini vóru við Norðlýsinum.

Uni Arge skorar, tá ÍA vinnur sær pláss í íslendsku steypafinaluni. Føroyski álopsmaðurin javnar, tá 93 minnuttir og 40 sekund eru leikt av dystinum móti FH.

**12. september**

Alt bendir á, at Súni Olsen ikki verður verandi í GÍ, tá kappingarárið er av. Fleiri útlendsk feløg liggja framvið eftir evnaríka leikaranum.

10 ár eru liðin, síðani Torkil Nielsen skeyt Føroyar á heimskortið við 1-0 málinum móti Eysturríki.




*Endiliga vinnur Regin Vágadal sína egnu kapping, og so kann hann endiliga rópa seg sjálvan »The Atlantic Giant«. Hetta hendir í kapping við m.a. heimsins sterkasta mann*

Í heimligu kappingini ger NSÍ aftur um seg. Hesa ferð er tað B68, sum má lata oddasessin frá sær. HB er nýtt oddalið í deildini.

**13. september**

Í donsku superliguni tykist FCK at hava sett ferð á. Todi Jónsson er í løtuni uttanfyri, eftir skaðan hann fekk móti slovenum.

Rógvi Johansen vinnur fyri sjeyndu ferð á rað FM í einkultstarti.

VB er nú á odda í bestu kvinnudeildini, eftir at tær vinna heili 6-0 á KÍ.

**14. september**

Í stórari samrøðu greiðir Tomislav Sivic frá, hví tað eftir hansara fatan hevur gingið so striltið hjá KÍ hetta kappingarárið.

**15. september**

Hondbólturin er so smátt um at fara ígongd, og um vikuskiftið skipar Kyndil fyri kapping fyri ovastu liðini frá undanfarna kappingarári.

**16. september**

Gunnleyg Berg úr Neistanum og Annika Ljósstein úr Stjørnuni verða bidnar um at koma til Íslands, har meistaraliðið, ÍBV, vil hava tær í hópin.

Í landskappingini er spenningurin stórur, nú HB og B68 tørna saman inni á Toftum.

Herfølge vinnur á svenska AIK, og tykist nærum vera komið víðari í UEFA cup kappingini.

KÍ-tvíburðarnir, Rannvá og Ragna Andreasen skulu til Noregs at venja, har Athen Moss, sum spælir í bestu deildini hevur sýnt áhuga.

**18. september**

Føroya Tele verður høvuðsstuðul hjá HSF, meðan Coca-Cola nú tekur sær av steypakappingini í hondbólti.

Sophus Dal-Christiansen, venjari hjá kvinnulandsliðnum, sigur, at tað nyttar einki, bara at vera við fyri at læra. Hann heldur, at krøv eiga at verða sett spælarunum.

**19. september**

Landsliðsleikararnir, sum spæla í Íslandi, eru í ringum skørum. Íslendska kappingin er av, og teir hava ikki møguleika at fáa dystarvenjing í føroyskum feløgum.

Enn er so avgjørt einki avgjørt í bestu mansdeildini. HB og VB eru ájøvn í stigatali, men stóri spurningurin tykist vera, hvat av liðunum er nummar eitt. FSF reglurnar eru ikki greiðar, so í Havn eru tey sannførd um, at HB er fremst, meðan vágbingar siga seg vera fremst.

Todi Jónsson er aftur tøkur hjá FCK, og hann ger góðan mun, tá teir vinna móti OB og Johan Byrial Hansen. Í Aarhus fær Óli Johannesen reytt kort tá AGF spælir javnt, meðan Herøflge tapir á heimavølli.

Í Íslandi noyðist Leiftur komandi ár at spæla í næstbestu deildini.

**20. september**

FSF kannar í løtuni, hvørt tað eru HB ella VB, sum eru á fremsta plássi í 1. deild hjá monnum.

KÍ vinnur heimadystin á VB, og nú eru tær so at siga meistarar. Ein dystur er eftir, og hesin er móti Skála, sum enn einki stig hevur fingið í endaspælinum.

**21. september**

HB ger nýggjan fýra ára sáttmála við Ion Geolgau.

Í stórari samrøðu sigur Rúni Nolsøe millum annað, at eftir hansara tykki er støði á føroyskum fótbólti ikki lækkað.

Skála hevur vunnið kappingina í triðju deild.

**22. september**

Áðrenn fráferðina til Sydney siga Esther G. Hansen og Heidi Andreasen, at tær hava sett sær sum mál at betra persónligu met síni.

Johan Byrial Hansen tykist nú at hava vunnið sær fast pláss á superliguliðnum hjá OB.

**23. september**

FSF hevur fingið svar frá løgfrøðingum sínum, og nú er staðfest, at HB er fremst í bestu mansdeildini. Mál í innanhýsis dystum hava einki at siga.

Gunnleyg Berg, sum hevur spælt á kvinnuliðnum hjá Neistanum, fer til ÍBV at spæla komandi ár. Annika Ljósstein varð eisini biðin, men hon takkaði kortini nei.

**26. september**

Vágur er á gosi. Besta mansliðið er á odda í bestu deildini, nú bert eitt umfar er eftir at spæla. HB missur stig móti B36, tá teir frammanfyri 2-1 misnýta brotsspark, og síðani síggja B36 javna. Í Vági ger heimaliðið bart, og sendir B68 úr FM-stríðnum.

EB/Streymur spælir javnleik á heimavølli móti ÍF, og tryggjar sær harvið uppflytan til bestu deildina.

Í Danmark vinnur OB á Herfølge, og teir báðir føroyingarnir eru báðir á liðnum.

Kvinnuliðið hjá KÍ vinnur avgerandi dystin á Skála, og tryggjar sær harvið meistaraheitið.

HSF samráðist við Føroya Tele og Coca-Cola um stuðulssáttmálar til komandi kappingarár.

**27. september**

Súni Olsen ger sáttmála við FC Zwolle í næstbestu deildini. Hann skal úr Føroyum eftir seinasta dystin hjá gøtumonnum.

AB missir alt í seinastu løtu, og dettur á fjórða plássið í triðju deild. Ístaðin sleppur B71 at spæla um upp- ella niðurflyting.

Inga Danberg verður biðin um at koma til Íslands, har ÍBV hevur tørv á einum bakki, nú Annika Ljósstein ikki vildi koma.

**28. september**

U-16 landsliðið er í løtuni í Hollandi, har teir bert eru fáar minuttir frá einum javnleiki móti Hvítarusslandi.

Úr Danmark frættist nú, at AGF verður bjargað fíggjarliga.

**29. september**

Í Vági gera tey seg til at syngja Baberara, nú seinasta umfar í landskappingini stendur fyri durum. Roknað verður við, at hópur av vágbingum fer at leita sær til Havnar, har VB spælir seinasta dystin.

Fyrsta umfar av hondbóltskappingini verður leikt hetta vikuskiftið.

U-16 landsliðið tapir 7-0 móti Hollandi.

Herfølge spælir javnt í seinna dystinum móti AIK, og er nú víðari til annað umfar í UEFA cup kappingini.